# AÐALFUNDUR HJÁ HAVBÚNAÐARFELAGNUM
# 31. MAI 2019

# ÁRSFRÁGREIÐING 2018

## Frágreiðing frá nevndini

### *Laksaaling*

*Framleiðsla og søla*

Framleiðslan av laksi frá føroyska havbúnaðinum var í 2018 uml. 65 tús. tons í kruvdari vekt, sum er nakað lægri enn í í 2017, tá havbúnaðurin framleiddi góð 71 tús. tons. Søluvirðið minkaði úr 3,9 mia. kr. í 2017 niður í 3,3 mia. kr. í 2018. Tó stendur føroyskur havbúnaður framvegis fyri slaka helvt av samlaða føroyska fiskavøruútflutninginum, og laksur er greitt tann størsta einstaka útflutningsvøran úr Føroyum.

Føroyskur havbúnaður marknaðarførir føroyskan laks sum eina hágóðsku fiskavøru, og prísurin, sum føroyskur laksur fær á marknaðinum, er eisini hægri pr. kg í mun til laksin hjá fremstu kappingarneytunum. Orsøkin til prísmunin er partvís, at kundarnar seta prís uppá góðskuna á føroyskum laksi, og at miðalvektin á føroyskum laksi er hægri enn hjá kappingarneytunum.

Gongdin seinastu 10 árini hevur verið tann, at alsamt størri partur av føroyska laksinum er seldur til marknaðir uttanfyri Evropa, serliga Russland, USA og Kina. Í 2008 fór uml. 85% av útflutningsvirðinum av aldum laksi til ES, men hesin partur er síðani minkaður so líðandi, og útflutningsvirðið av laksi til ES-lond er í 2018 komið niður á 27% av samlaða virðinum av laksaútflutninginum.

Nevndin í Havbúnaðarfelagnum hevur nú í nøkur ár víst á, hvussu umráðandi tað er, at føroysku myndugleikarnir raðfesta arbeiðið við at betra marknaðaratgongdina til hesar nýggju marknaðirnar, so føroysku fyritøkurnar ikki missa kappingarføri av hesum ávum. At hetta er ein reellur vandi sæst m.a. á kinesiska marknaðinum, har bæði Kili og Ísland hava tollfrælsi fyri sínar vørur, og Noreg er komið langt í samráðingum um fríhandilsavtalu við Kina. Føroyar hava í løtuni onga handilsavtalu við Kina, og kann hetta seta útflutningin av laksi til Kina í vanda, serliga um Noreg og Kina koma á mál við sínamillum handilssamráðingunum. Umleið 16% av føroyska laksinum fór í 2018 á kinesiska marknaðin, og um Noreg fær tollfrælsi fyri sín laksaútflutning, verður sera torført fyri ikki at siga ógjørligt at kappast.

EABS (Russland) er vorðin ein sera týðandi keypari av føroyskum laksi, og tí er tað positivt, at føroyskir myndugleikar nú gera royndir at sleppa til samráðingarborðið við búskaparsamgonguna um frælsari handilsviðurskifti.

Karmarnir kring framleiðsluna eru annars sum heild góðir, og vinnan hevur seinastu árini havt góð úrslit, tá hugt verður at vøkstri, fóðurfaktori og framleiðslukostnaði. Fellið hevur tó verið hækkandi seinastu árini, serliga orsakað av nýggjum ikki-medisinskum avlúsingarhættum, sum krevja meira handfaring av fiskinum.

Saman við skynsamari lívfrøðiligari stýring hevur tann framvegis óvanliga høgi laksaprísurin havt við sær, at feløgini hava havt góð fíggjarlig úrslit í 2018. Fyritøkurnar hava nýtt týðandi part av úrslitinum til at gera íløgur í útbygging av smoltstøðunum, nýggj tænastuskip og tól til ikki-medisinska lúsafyribyrging og -viðgerð. Eisini í komandi árum er ætlanin at gera stórar íløgur. Slíkar íløgur eru viðvirkandi til at minka um lívfrøðiliga váðan, og kunnu geva møguleikar fyri at økja um framleiðsluna á ein burðardyggan hátt við tað, at smoltini eru størri áðrenn tey koma í ringarnar.

Nógva staðni kring heimin verða royndir gjørdar við aling á opnum havi, og alla staðni vísir tað seg at vera ein avbjóðing. Tó eru møguleikarnir stórir, um tað fæst at bera til. Havbúnaðarfelagið heldur, at ein háttur at gjørt sær nakrar royndir við hesum í Føroyum hevði verið at loyvt flyting av laksi millum ein alifjørð og til og frá opnum havi. Serliga í summarhálvuni kann tað bera til at ala uttanfyri verandi alifirðir, og um tað fæst at rigga eftir ætlan, kann tað eisini vera við til at økja um framleiðsluna á ein burðardyggan hátt.

*Lívfrøðiligir váðar*

Laksalúsin er framvegis ein trupulleiki fyri føroyska aling, eins og hon er í laksaframleiðslu kring allan heimin, og eigur trupulleikin framvegis at verða tikin í størsta álvara. Lúsastøðan er higartil í ár undir kontroll, samstundis sum heilivágsnýtslan er minkað í stórum. Orsøkin til positivu gongdina er serliga tær íløgur, sum eru gjørdar við tí endamáli at gera alingina meira burðardygga við ikki-medisinska fyribyrging og viðgerð.

Umframt at framleiða alsamt størri smolt, nýta feløgini eisini m.a. rognkelsi, feskvatnsviðgerð, mekaniska avlúsing og avlúsing við flógvum vatni at halda lúsatalinum niðri uttan medisinska viðgerð.

Í 2014 vórðu tey fyrstu rognkelsini sett út í føroyskar aliringar, og rognkelsi verða í dag nýtt sum ein fastur liður í átøkunum móti laksalúsini. Tað er framvegis neyðugt at innflyta rognkelsi til Føroya, tí regluverkið kring rognkelsisframleiðslu í Føroyum ikki er komið uppá pláss. Alifeløgini ynskja, at farið verður undir rognkelsisframleiðslu í Føroyum, fyri at kunna tryggja eina støðuga tilgongd av rognkelsum. Hóast tað hevur tikið drúgva tíð, eru framvegis útlit til, at regluverk, sum ger tað møguligt at framleiða rognkelsi í Føroyum, er ávegis.

Myndugleikarnir hava í eina tíð arbeitt við at endurskoða rakstrarkunngerðina og Havbúnaðarfelagið heldur tað vera positivt, at hetta verður gjørt, so tað kann tryggjast, at karmarnir kring lívfrøðiligu framleiðsluna altíð eru dagførdir. Havbúnaðarfelagið heldur, at slíkar endurskoðanir av týðandi lógarverki eiga at taka støði í einari váðameting, so tað verður tryggjað, at tað eru tey mest viðkomandi viðurskiftini, sum arbeitt verður við.

*Burðardygd*

Matvøruframleiðslan í heiminum er størsta kelda til umhvørvisárin og trýst á mørkini fyri, hvat náttúran megnar. Laksaaling er lutfalsliga nógv burðardyggari enn flest aðrar protein framleiðslur. Føroyskur havbúnaður arbeiðir støðugt við at tryggja, at alingin kann fara fram á burðardyggum grundarlagi, og at menna teir framleiðsluhættir, sum verða nýttir, so komandi ættarlið arva eina náttúru, sum er í betri standi tá vit lata hana frá okkum, enn tá vit fingu hana at umsita.

Fleiri altjóða non-profit felagsskapir gera metingar av umhvørvisávirkanini frá eitt nú alivirksemi, og gera tilráðingar til brúkararnar, um hvørjar fiskavørur tey mæla teimum til at keypa. Ein tann kendasti og mest viðurkendi av hesum, Seafood Watch, hevur í september 2018 endað drúgt kanningararbeiði av føroyskum havbúnaði, og varð niðurstøðan hjá felagsskapinum, at føroyskur alilaksur er eitt “good alternative” hjá brúkarunum at keypa. Bert heilt fá aliøki og brands kring heimin hava fingið slíkt gott skoðsmál fyri umhvørvisávirkanina.

Havbúnaðarfelagið hevur eftir áheitan frá Seafood Watch hjálpt teimum við at fáa til vega tey data, sum tey hava haft brúk fyri, fyri at kunna gera sínar metingar. Eisini almennir myndugleikar og granskingarstovnar hava latið data til Seafod Watch.

*Marknaðarútlit*

Heimsframleiðslan av laksi vaks við uml. 5% í 2018, og vøksturin í marknaðarútboðnum var 6%, í mun til 2017. Hóast henda vøkstur helt miðal heimsmarknaðarprísurin fyri laksi sær rímuliga væl, tó at hann var eitt vet lægri enn árið fyri. Heimsframleiðslan av laksi veksur í 2019 væntandi uml. 4-6% í mun til í fjør. Hóast henda vøkstur er væntandi, at miðal heimsmarknaðarprísurin á laksi í 2019 helst verður á nakað sama støði sum í 2018.

Tað er ivasamt, hvørja ávirkan høgi laksaprísurin kann fáa á marknaðin uppá longri sikt. Høgi prísurin hevur eisini við sær, at íløgur verða gjørdar í alistøðir á landi nærri stóru marknaðunum, eitt nú í USA og Kina. Um framleiðslan fæst at virka eftir ætlan, og vøksturin í útboðnum av laksi frá sjógvalingini framvegis verður avmarkaður, kann hetta eggja til, at fleiri slíkar støðir verða bygdar nærhendis stóru marknaðunum í Asia og Norðuramerika. Harumframt ger høgi laksaprísurin, at tað eisini verður arbeitt skjótari við at menna nýggj sjógvaliøki kring heimin.

Hóast prísurin í løtuni er góður, er tí umráðandi at minnast til, at man við tíðini kann enda aftur í einari støðu, har lítil munur er á framleiðsluprísi og søluprísi. Uppá stutt sikt, eru marknaðarútlitini tó góð, um einki óvæntað hendir.

Í 2018 vórðu uml. 16,9 mió. laksasmolt sett út í Føroyum. Hetta er meira enn í 2017, tá umleið 14,5 mió. smolt vórðu sett út. Seinastu árini hevur útsetingin ligið um 15 mió smolt um árið. Havast skal eisini havast í huga, at miðal smoltvektin er økt seinastu árini, sum so eisini merkir, at hvørt einstakt smolt er styttri tíð á sjónum. Í 2014 var eitt smolt í miðal í sjónum í 18 mánaðir áðrenn tøku, meðan tað í 2018 var á sjónum í 16,5 mánaðir áðrenn tøku. Miðal smoltstøddin við útsetu øktist úr 245 g í 2017 upp í 271 g í 2018. Miðal smoltvektin er tí meira enn tvífaldað síðan 2013.

*Kappingarførir karmar*

Tað hevur alstóran týdning fyri føroyska alivinnu, at karmarnir at arbeiða undir ikki eru verri enn hjá okkara kappingarneytum.

1. januar 2019 varð skipanin við loyvisskatti fyri laksaalifyritøkur enn einaferð broytt, soleiðis at hægsta loyvisgjaldið varð hækkað úr 4,5% upp í 5% av roknaða søluvirðinum. Samstundis vóru mørkini hækkaði fyri, nær gjaldast skal hægri loyvisgjald. Hægsta loyvisgjaldið skal nú gjaldast, tá marknaðarprísurin er 36 kr ella hægri. Marknaðurprísurin hevur nú í longri tíð verið væl hægri enn hetta mark, so alifyritøkurnar gjalda framvegis hægsta gjald.

Harumframt rinda fyritøkurnar og eigarar tess vanligan partafelags- og vinningsbýtisskatt.

Havbúnaðarfelagið hevur víst á, at tað við skipanini við avgjaldi á søluvirði er reellur vandi fyri, at alifyritøkur noyðast at gjalda skatt, hóast virksemið skuldi givið undirskot. Nevndin í Havbúnaðarfelagnum heldur, at skattur eigur at vera rindaður av yvirskotinum, og ikki av umsetninginum, tí so vita fyritøkurnar, at tær skulu rinda skatt, tá tær forvinna pengar, og ikki tá undirskot er.

Føroysku alifyritøkurnar rindaðu tils. 435 mió kr. í partafelagsskatti, tøkugjaldi og kapitalvinningsskatti fyri árið 2018.

***Tari***

Taraaling er framvegis á byrjanarstøði í Føroyum, og feløgini bíða eftir dagførdum lógarverki kring virksemið. Í løtuni eru tvey feløg, sum ala og skera tara.

Umleið 45 tons av tara í vátari vekt vórðu skorin og seld tilsamans í 2018. Hetta svarar til umleið 4½ tons í turrari vekt. Tað er nakað minni enn í 2017, tá 50 tons í vátari vekt vórðu heystað. Tað mesta varð útflutt til ES-lond, til matvøruframleiðslu (ingrediens- og liðugvøra) og til fóður, meðan ein minni partur varð framleiddur og seldur í Føroyum sum turkaðir úrdráttir til matna, bæði til føroyingar og til ferðafólk. Feløgini vænta at skera omanfyri 100 tons í 2019.

Í løtuni finst eingin vistfrøðilig sertifisering til føroyska taraaling. Av somu orsøk hevur tað víst seg at vera trupult at selja taraframleiðsluna til teir bestu altjóða marknaðirnar, og kundar verða mistir av hesum ávum.

# Innihaldsyvirlit

1. ENDAMÁL HAVBÚNAÐARFELAGSINS ..... 9

2. ALMENT UM GONGDINA Í HAVBÚNAÐINUM ..... 10

2.1 Framleiðsla ..... 11
2.2 Útseting av smolti ..... 13
2.3 Útflutningur ..... 14
2.4 Prísir ..... 14
2.5 Býtið av útflutningi ..... 17
2.6. Marknaðir ..... 19
2.7 Býtið seinastu árini ..... 20

3. MÁL FELAGIÐ HEVUR ARBEITT VIÐ Í ÁRINUM ..... 21

3.1 Aliráðstevnan ..... 21
3.2. Meting frá Seafood Watch ..... 21
3.3. Ætlan fyri handfaring av slopnum alilaksi ..... 22
3.4. Marine Mammals Protection Act ..... 22
3.5. Útbúgving av starvsfólki til alivinnuna ..... 22
3.6 Altjóða samstarv ..... 22
3.7. Salmon from the Faroes ..... 22

4. LÓGIR OG KUNNGERÐIR ..... 24

4.1 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu ..... 24
4.2. Kunngerð um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum (rakstrarkunngerðin) ..... 24
4.3 Kunngerðir um tillutan og útbjóðing av aliloyvum ..... 24
4.4. Løgtingslóg um kóp ..... 25
4.5 Løgtingslóg um náttúrumargfeldni ..... 25

## 1. Endamál Havbúnaðarfelagsins

Havbúnaðarfelagið er vinnugreinafelag hjá føroyskum havbúnaði - bæði á sjógvi og á landi. Endamál felagsins er at fremja tey mál, ið eru av felags áhuga fyri limirnar. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av føroyskum havbúnaði.

Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Í nevndini í Havbúnaðarfelagnum sita:
Atli Gregersen, Luna/Hiddenfjord
Hans Jákup Mikkelsen, MOWI Føroyar
Regin Jacobsen, Bakkafrost

## 2. Alment um gongdina í havbúnaðinum

Gongdin í havbúnaðinum í Føroyum er framvegis góð, og fíggjarligu úrslitini seinastu árini hava somuleiðis verið góð. Karmarnir kring havbúnaðin eru sum heild góðir, hóast vinna og myndugleikar áhaldandi mugu hava eyguni opin fyri møguligum broytingum, ið kunnu gerast til tað betra. Tað er av alstórum týdningi, at havbúnaðurin framhaldandi leggur dent á skynsaman rakstur við neyvari framleiðslustýring.

Føroyskur havbúnaður hevur seinastu árini kunnað víst á góð úrslit viðvíkjandi vøkstri, fóðurfaktori, framleiðslukostnaði og prísi. Fellið hevur eisini verið lágt, tó at tað hevur verið hækkandi seinastu árini. Samanborið við aðrar havbúnaðartjóðir hevur føroyskur havbúnaður góð úrslit at vísa á, og tað er eisini grundarlagið undir teimum góðu úrslitunum seinastu árini.

Síðan kreppuna í føroyskum havbúnaði fyrst í hesari øldini, er framleiðslan av alifiski økt støðugt. Framleiðslan í 2018 var uml. 65.000 tons í kruvdari vekt, sum er ein minking í mun til tey uml. 71.000 tonsini, sum vórðu framleidd í 2017.

Útflutningsvirðið av laksi var í 2018 uml. 3,3 mia. kr. samanborið við uml. 3,9 mia. kr. í 2017. Samanumtikið hevur 2018 verið eitt gott ár við støðugari framleiðslu og høgum miðalprísi.

Heimsframleiðslan av laksi veksur í 2019 væntandi uml. 4-6 % í mun til í fjør. Hóast henda vøkstur er væntandi, at miðal heimsmarknaðarprísurin á laksi í 2019 helst verður á nakað sama støði sum í 2018. Forward prísirnir á Fish Pool vísa, at prísurin kann væntast at lækka eitt sindur í seinna hálvári í mun til fyrra hálvár í ár.

Við ásetingum um árgangssundurskiljing, økishvíld og sjúkufyribyrgjandi atburði, verður mett, at alivinnan hevur karmar fyri burðardyggum rakstri. Tað er sera týdningarmikið, at vinnan og myndugleikarnir framhaldandi arbeiða við at betra hesar karmar, og tað er tí positivt, at myndugleikarnir hava tikið stig til at endurskoða rakstrarkunngerðina.

## 2.1 Framleiðsla

### Laksur

Tøkan av laksi í 2018 var uml. 79 tús. tons í livandi vekt, sum er nakað minni enn í 2017. Í mynd 1 sæst annars, at framleiðslan í alivinnuni fyrstu árini aftaná kreppuárini fyrst í hesari øldini øktist munandi, men at árliga framleiðslan seinastu 5-6 árini hevur verið meira støðug.

Eins og undanfarin ár vórðu eingi síl tikin í 2018.

**Mynd 1. Tøka av laksi og sílum (rund vekt) 2005-2018**




| | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 4,493 | 5,482 | 7,648 | 9,000 | 8,800 | 2,382 | 0,000 | 0,000 | 0,960 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 |
| Laks | 18,962 | 13,083 | 22,305 | 38,851 | 51,500 | 45,410 | 60,497 | 76,803 | 75,852 | 86,489 | 80,629 | 85,825 | 86,830 | 78,975 |

Kelda: Rúni Dam, sp/f Avrik.

Mynd 2 vísir tøkuna av alifiski í kruvdari vekt viku fyri viku í 2018. Her sæst, hvussu tøkan av alifiski býtir seg yvir árið. Tað hevur fyrr verið vanligt, at størstu nøgdirnar vórðu tiknar um heystið, men í nýggjari tíð hevur tøkan verið býtt meira javnt út á árið, tó at sum heild minni verður tikið á hásumri.

**Mynd 2. Tøka av alifiski (kg kruvd vekt) viku fyri viku í 2018**




Kelda: Havbúnaðarfelagið

## Tari

Tilsamans uml. 45 tons av tara í vátari vekt vórðu heystað og seld í 2018. Hetta svarar til umleið 4,5 tons í turrari vekt. Tað er nakað minni enn í 2017, tá 50 tons í vátari vekt vórðu heystað. Feløgini vænta at heysta omanfyri 100 tons tilsamans í 2019. Talan er um ymisk sløg av tara.

Tað mesta varð í 2018 útflutt til ES-lond, til matvøruframleiðslu (granulat og liðugvøru) og til fóður, meðan ein lítil partur varð framleiddur og seldur í Føroyum sum turkaðir úrdráttir til matna, bæði til føroyingar og til útlendsk ferðafólk.

## 2.2 Útseting av smolti

Mynd 3 vísir útseting av laksi og sílum síðani aldarskiftið. Myndin vísir, at útsetingin aftaná at verða økt nokk so nógv aftaná kreppuna í alivinnuna, hevur verið meira støðug seinnu árini, uml. 15 mió stk. árliga. Útsetingin í 2018 var umleið 16,9 mió. smolt, ein vøkstur á uml. 2,4 mió smolt í mun til 2017. Vert er at leggja til merkis, at útsetingin framvegis er væl lægri, enn hon var árini eftir aldarskiftið. Havast skal eisini havast í huga, at miðal smoltvektin er økt seinastu árini, sum so eisini merkir, at hvørt einstakt smolt er styttri tíð á sjónum. Í 2014 var eitt smolt í miðal í sjónum í 18 mánaðir áðrenn tøku, meðan tað í 2018 var á sjónum í 16,5 mánaðir áðrenn tøku.

Miðal smoltstøddin við útsetu øktist úr 245 g í 2017 upp í 271 g í 2018. Miðal smoltvektin er meira enn tvífaldað síðani 2013, og við teimum íløgum sum eru gjørdar, og framvegis verða gjørdar, í størri smoltstøðir á landi, væntast miðal smoltvektin framhaldandi at økjast í komandi árum.

Síðan 2010 eru eingi síl sett út.

**Mynd 3. Útseting av smolti frá 2000 til 2018**




Kelda: Rúni Dam, Sp/f Avrik

## 2.3 Útflutningur

Útflutningsvirðið av alilaksi var í 2018 góðar 3,3 mia. kr., sum er ein minking á uml. 500 mió kr. í mun til undanfarna ár. Minni varð framleitt, og prísurin kvinkaði eitt sindur niður.

Seinnu árini er í roynd og veru talan um útflutning av laksi. Laksur er í dag størsta einstaka útflutningsvøran hjá Føroyum og laksur frá føroyskum havbúnaðinum er knapt helvtina av fiskavøruútflutninginum hjá Føroyum.

**Mynd 4. Útflutningsvirðið av alifiski frá 2009 til 2018 (1000 kr.)**




| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| LAKSUR | 1.203.595 | 1.338.081 | 1.618.393 | 1.822.514 | 2.456.409 | 2.950.538 | 2.799.127 | 3.661.704 | 3.867.656 | 3.342.009 |

Kelda: Hagstova Føroya

## 2.4 Prísir

Marknaðarprísurin á laksi hevur aftur hildið sær á einum høgum støði í 2018. Miðalprísurin á heilum, feskum føroyskum laksi var í 2018 53 kr./kg, sum er eitt vet minni enn í 2017, tá miðalprísurin var uml. 55 kr./kg.

Prísurin hevur seinnu árini verið umleið tað dupulta av tí, hann var í 2012, tá hann var 28 kr/kg. Miðalprísurin lá í tíðarskeiðnum 2013-2015 nakað omanfyri 40 kr./kg, men í 2016 fór miðalprísurin tó upp á 55 kr/kg, og hann hevur hildið sær á tí støðinum í 2017 og 2018 eisini. Eisini prísurin á frystum flaki (herundir laksaportiónum) hevur hildið sær. Vanliga má roknast við, at ein hækkandi vinningur eisini førir til, at fleiri koma inn á marknaðin, og dríva prísin niðureftir. Tað hevur tó víst seg at vera torført at hækka framleiðsluna skjótt, tí tað er torført at vaksa munandi um framleiðsluna frá verandi aliøkjum.

Mynd 5 vísir ein ársmiðalprís á feskum kruvdum laksi frá 1998 til 2018. Sum myndin vísir, eru nakrir prístindar og nakrar prísgjáir. Tað sæst eisini, at í 2003 var miðalprísurin fyri feskan føroyskan laks einans 16 kr/kg.

Útlitini fyri marknaðarprísinum komandi árini eru sjálvandi nógv tengd at gongdini í samlaðu framleiðsluni í heiminum. Samlaða heimsframleiðslan er serliga tengd at, hvussu tað eydnast at minka um trupulleikan við laksalúsini, sum hevur verið ein avbjóðing um allan heim. Eisini er tað ein spurningur, hvussu skjótt tað fer at ganga at menna aling á landi fram til tøku.
Mett verður, at framleiðslan av laksi fer at vaksa við uml. 4-6 % í 2019, meðan heimsmarknaðurprísurin fyri árið 2019 væntast at halda sær á nakað sama støði sum í 2018.

**Mynd 5. Ársmiðal prísir á feskum kruvdum laksi (ársins prísir). FOB Føroyar**




| | ´98 | ´99 | ´00 | ´01 | ´02 | ´03 | ´04 | ´05 | ´06 | ´07 | ´08 | ´09 | ´10 | ´11 | ´12 | ´13 | ´14 | ´15 | ´16 | ´17 | ´18 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prísur | 21 | 24 | 28 | 20 | 19 | 16 | 18 | 22 | 30 | 25 | 24 | 28 | 37 | 31 | 28 | 41 | 41 | 43 | 55 | 55 | 53 |

Kelda: Hagstova Føroya

Framleiðslan av laksaportiónum tók veruliga dik á seg í 2003, og mynd 6 vísir miðalprísin á frystum laksaportiónum seinastu tíggju árini. Í 2018 fekst hægsti miðalprísur nakrantíð fyri laksaportiónirnar, tá miðalprísurin var omanfyri 100 kr./kg, tó at framleiðslan var væl minni enn undanfarin ár. Av tí, at prísurin á laksaportiónum í stóran mun verður ásettur í langtíðarsáttmálum, er prísurin ofta meira støðugur enn á øðrum laksavørum.

**Mynd 6. Miðalprísur pr. kg av frystum laksaflaki (laksaportiónum) 2009-2018.**




| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| kr/kg | 53,69 | 66,88 | 71,67 | 58,58 | 65,33 | 79,13 | 80,63 | 83,52 | 95,74 | 100,91 |

Kelda: Hagstova Føroya

## 2.5 Býtið av útflutningi

Mynd 7 vísir býtið av útflutninginum í virði frá 2009 til 2018. Nógv tann størsti parturin er framvegis heilur feskur laksur, sum í fjør hevði eitt útflutningsvirði á góðar 2,8 mia. kr. Síðan 2007 er útflutningurin av laksaportiónum sum heild øktur, men hann minkaði í 2018 við góðum 500 mió kr. í mun til árið fyri. Lítið verður útflutt av heilum frystum laksi.

**Mynd 7. Býtið av útflutningi  av laksavørum 2008-2017**




Kelda: Hagstova Føroya

Í mynd 8 sæst prosentvísa býtið av útflutningsvirðinum millum ymisku laksavørurnar. Her sæst m.a. at útflutningsvirðið av heilum feskum laksi nú í fleiri ár hevur verið uml. 70% av samlaða útflutninginum, men at tað í 2018 nærkaðist 85%. Laksaportiónirnar hava eisini ligið nokk so støðugt við einum parti á uml. 20-25 % seinastu árini, men minkaðu niður í uml. 11% í 2018.

**Mynd 8. Prosentbýtið í útflutningsvirðinum av laksavørum**



## 2.6. Marknaðir

Seinastu tíggju árini er hend ein globalisering av føroyskum laksaútflutningi (mynd 9). Frá at hava útflutt 70 % til ES-marknaðin í 2009, er tann lutfalsligi parturin, sum fer til ES, sum heild minkaður seinastu árini. Ikki tí so nógv minni nøgdir vera útfluttar til ES, men tí størri partur av vøkstrinum í framleiðsluni verður útfluttur til marknaðir uttanfyri ES. Uttanfyri ES er tað serliga USA, EABS (Russland) og Kina, sum keypa føroyskan laks. Tilsamans fer uml. 96 % av laksaútflutninginum til hesar fýra marknaðirnar.

Frá at hava útflutt lítið og einki til Kina, er landið seinastu 10 árini vorðing ein týðandi keypari av føroyskum laksi, og í 2018 fóru uml. 16 % av føroyska laksaútflutninginum til Kina. USA hevur ligið nokk so støðugt millum 20-30% av laksaútflutninginum, og í 2018 fóru uml. 20% av laksaútflutningnum hagar. Størsti lutfalsligi vøksturin hevur tó seinnu árini verið í útflutninginum til EABS (Russlands), og uml. 34 % av laksinum vóru seld til Russlands í 2018.

**Mynd 9. Býtið av laksaútflutningi á høvuðsmarknaðirnar 2009-2018**




Kelda: Hagstova Føroya.

## 2.7 Býtið seinastu árini

Niðanfyri er eitt samlað yvirlit yvir útflutningsvirði, nøgd og prísir fyri ymsu vørurnar, sum alivinnan framleiðir. Tølini eru fyri seinastu tíggju árini.

Talva 1. Útflutningsvirðið fyri ymsu vørubólkarnar frá 2009 til 2018, í tús. kr. *

| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 795.934 | 803.161 | 1.113.741 | 1.282.705 | 1.720.921 | 1.970.142 | 1.949.770 | 2.741.263 | 2.781.094 | 2.811.989 |
| Frystur laksur | 68.587 | 69.508 | 26.508 | 40.018 | 45.235 | 23.257 | 34.902 | 8.390 | 30.731 | 18.798 |
| Laksaportiónir | 303.505 | 423.931 | 428.702 | 447.138 | 618.848 | 852.652 | 693.524 | 777.419 | 916.661 | 384.081 |
| Laksur, annað | 34.703 | 41.482 | 48.332 | 51.599 | 71.406 | 103.545 | 120.930 | 133.999 | 139.170 | 107.141 |
| Síl tilsamans | 175.082 | 69.954 | 8.724 | 195 | 2.585 | 273 | 152 | 183 | 805 | 0 |
| **Tilsamans** | **1.377.809** | **1.408.035** | **1.626.007** | **1.821.654** | **2.458.994** | **2.949.869** | **2.799.279** | **3.661.253** | **3.871.636** | **3.346.963** |

Talva 2. Útflutningsnøgdin fyri ymsu vørurnar frá 2009 til 2018, tons *

| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 28.489 | 21.541 | 35.549 | 45.067 | 42.312 | 47.565 | 45.329 | 49.854 | 50.340 | 53.562 |
| Frystur laksur | 2.587 | 1.778 | 747 | 1.483 | 1.204 | 611 | 983 | 194 | 560 | 376 |
| Laksaportiónir | 5.653 | 6.339 | 5.982 | 7.633 | 9.473 | 10.775 | 8.601 | 9.308 | 9.574 | 3.806 |
| Laksur, annað | 3.835 | 4.037 | 3.977 | 4.881 | 5.922 | 7.918 | 7.189 | 1.918 | 1.827 | 1.454 |
| Síl tilsamans | 7.171 | 2.194 | 238 | 26 | 91 | 15 | 4 | 26 | 40 | 167 |
| **Tilsamans** | **47.734** | **35.888** | **46.492** | **59.089** | **59.002** | **66.884** | **62.106** | **61.300** | **62.341** | **59.364** |

Talva 3. Miðal útflutningsprísir fyri ymsu vørurnar frá 2009 til 2018, kr. pr. kg. *

| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 27,94 | 37,29 | 31,33 | 28,46 | 40,67 | 41,42 | 43,01 | 54,99 | 55,25 | 52,87 |
| Frystur laksur | 26,52 | 39,09 | 35,49 | 26,99 | 37,56 | 38,07 | 35,50 | 43,18 | 54,89 | 49,97 |
| Laksaportiónir | 53,69 | 66,88 | 71,67 | 58,58 | 65,33 | 79,13 | 80,62 | 83,52 | 95,75 | 100,91 |
| Fesk síl | 23,47 | 34,45 | 74,53 | - | 22,47 | - | - | - | 99,56 | 29,70 |
| Fryst síl | 24,78 | 31,90 | 33,58 | - | 28,92 | 18,07 | - | - | - | - |

Kelda: Hagstova Føroya

* Orsakað av einari broyting í uppgerðarháttinum, kunnu tølini áðrenn 2016 ikki uttan víðari sammetast við tølini í 2016 og seinni

## 3. Mál felagið hevur arbeitt við í árinum

Her er ein stutt frágreiðing um nøkur mál, ið nevndin hevur arbeitt við seinasta árið.

### 3.1 Aliráðstevnan

Havbúnaðarfelagið skipar á hvørjum ári fyri aliráðstevnu, sum tey seinastu árini hevur verið hildin á Hotel Føroyum. Ráðstevnan er vorðin fastur táttur í virkseminum hjá Havbúnaðarfelagnum. Ætlanin við Aliráðstevnuni er at førleikamenna starvsfólkið innan havbúnaðin, og at geva starvsfólkunum og fólki við áhuga í havbúnaði møguleika at hittast og netverka.

Miðað verður eftir at hava eina fjølbroytta skrá, so allir luttakararnir kunnu fáa okkurt burturúr teimum fyrilestrum, ið verða hildnir. Aliráðstevnan var í ár sera væl vitjað við uml. fýra hundrað gestum, og stórur partur av framløgunum í ár snúðu seg um úrslit frá føroyskum granskingarverkætlanum innan aling. Eisini varð fokus sett á burðardygd innan aling og matvøruframleiðslu.

Framløgurnar frá Aliráðstevnunum eru at finna á heimasíðuni hjá vinnuhúsinum www.industry.fo

### 3.2. Meting frá Seafood Watch

Ymiskar non-profit felagsskapir, sum gera óheftar tilráðingar til brúkarar um keyp af fiskavørum, hava vent sær til Havbúnaðarfelagið í sambandi við, at teir eru farnir undir at gera eina meting av føroyskum laks. Havbúnaðarfelagið hevur m.a. hjálpt teimum at fáa til vega hagtøl og upplýsingar um føroysku alivinnuna.

Tann mest kendi av hesum felagsskapum á amerikanska marknaðinum, Seafood Watch, hevur gjørt drúgt kanningararbeiði av umhvørvisávirkanini frá føroyskum havbúnaði, og kunngjørdi í september 2018, at føroyskur alilaksur var eitt “good alternative” hjá brúkarunum. Bert heilt fá aliøki og brands kring heimin hava fingið slíkt gott skoðsmál fyri umhvørvisávirkanina.

Seafood Watch hevur samstarv við eina røð av matstovum og øðrum virkjum, og tað ber til hjá fólki at ogna sær teirra forbrúkaraguide í pappírsútgávu og talgilt. Sostatt skuldi góða skoðsmálið verið eina fyrimunur fyri marknaðarføringina av føroyskum alilaksi, serliga á amerikanska marknaðinum.

## 3.3. Ætlan fyri handfaring av slopnum alilaksi

Í sambandi við, at tað á heysti 2018 varð staðfest stór nøgd av alilaksi í Leyná og aðrastaðni, hevur Havbúnaðarfelagið tikið stig til at gera eina ætlan fyri, hvussu slíkar støður skulu handfarast framyvir. Ætlanin byggir partvíst á tær royndir, sum man fekk í sambandi við arbeiðið at fanga slopna alifiskin og fáa hann til høldar. Væntandi verður eitt útkast liðugt næstum, sum kann viðgerast saman við teimum viðkomandi áhugapørtunum.

## 3.4. Marine Mammals Protection Act

Amerikanskir myndugleikar hava sett krav um, at øll lond, sum vilja útflyta fiskavørur til USA eftir 1. Januar 2022 skulu hava eina váttan um, at teirra reglur um verju av havsúgdjórum í sambandi við fiskiskap og aling eru sambærligar við amerikansku reglurnar. Tað er tí neyðugt hjá føroyskum myndugleikum at fáa eina slíka váttan, um vit framhaldandi skulu útflyta fiskavørur til USA aftaná 1. Januar 2022.

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hevur ábyrgdina av góðkenningini viðv. alingini, meðan Fiskimálaráðið hevur ábyrgdina av góðkenningini viðv. veiddum fiski. Bólkur við umboðum úr Uttanríkis- og vinnumálaráðmnum, Fiskimálaráðnum, Havbúnaðarfelagnum og Náttúrugripasavninum samskipar arbeiðið.

Amerikanskir myndugleikar hava gjørt eina heimasíðu, har útlendskir myndugleikar skulu skráseta upplýsingar um teirra aling og fiskiskap. Talan er um eitt rættiliga umfatandi arbeiði, og Havbúnaðarfelagið samstarvar við føroysku myndugleikarnar um skrásetingarnar.

## 3.5. Útbúgving av starvsfólki til alivinnuna

Havbúnaðarfelagið arbeiðir saman við alifeløgunum um eina verkætlan at fáa útbúgvingarverkið at bjóða fram eina yrkisútbúgving innan aling í Føroyum.

## 3.6 Altjóða samstarv

Havbúnaðarfelagið er limur í altjóða felagsskapunum ISFA (International Salmon Farmers Association). Fundir eru hálvárliga, og luttekur Havbúnaðarfelagið á hesum fundum, í tann mun tað er praktiskt møguligt.

## 3.7. Salmon from the Faroes

Felagið eigur og rekur heimasíðuna Salmon from the Faroe Islands (www.salmon.fo). Tað koma javnan fyrispurningar um føroyskan havbúnað gjøgnum hesa síðuna, bæði frá

keyparum og frá endabrúkarum. Fyrispurningarnir kunnu í stórum býtast í tvey: Fyrispurningar um keyp av føroyskum laksi og fyrispurningar um, hvussu framleiðslan er skipað. Undir hesum síðsta eru eitt nú fyrispurningar um fóður, heilivágsnýtslu, ymisk úrslit frá yvirvøkuskipanum o.s.fr. Í hesum sambandi er tað ein stórur fyrimunur fyri føroyskan havbúnað at kunna vísa á, at einki antibiotika verður nýtt, og at fóðrið er non-GMO.

## 4. Lógir og kunngerðir

Síðan seinasta aðalfund eru hesar lógir og kunngerðir, ið hava týdning fyri alivinnuna, settar í verk ella hava verið til viðgerðar:

### 4.1 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu

Endamálið við lógaruppskotinum var serliga at hækka hægsta tøkugjaldið, sum alifyritøkur skulu gjalda í s.v. tøku av alifiski, úr 4,5 % upp í 5 % av einum roknaðum søluvirði. Uppskotið var ikki sent til hoyringar, men Havbúnaðarfelagið var tó á fundi við Uttanríkis- og Vinnumálaráðið, har felagið m.a. mælti til at endurskoða mørkini fyri, nær man skal gjalda ávíkavist 0,5 %, 2,5 % og 5 % í tøkugjaldi, so hesi mørkini samsvaraðu betri við framleiðslukostnaðin. Hesum tók UVMR og Løgtingið undir við, so mørkini eru nú hesi:

| Heimsmarknaðarprísur á laksi | Loyvisgjald |
|---|---|
| < 32 DKK/kg | 0,5 % |
| ≥ 32 DKK/kg og < 36 DKK/kg | 2,5 % |
| ≥ 36 DKK/kg | 5,0 % |

### 4.2. Kunngerð um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum (rakstrarkunngerðin)

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur saman við Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum í longri tíð arbeitt við at endurskoða rakstrarkunngerðina. Rakstrarkunngerðin er bulurin í lóggávuni, sum skal fyribyrgja sjúkur og smittuspjaðing í alingini, so talan er um týðandi endurskoðanararbeiði.

Havbúnaðarfelagið hevur viðmerkt, at broytingar í slíkari lóggávu eiga at verða grundaði á eina váðameting, so tey mest týðandi viðurskiftini eru dagførd. Harumframt hevur Havbúnaðarfelagið sent inn drúgt hoyringssvar til ítøkiligu ásetingarnar í kunngerðini. Væntandi verður kunngerðin lýst i næstum.

### 4.3 Kunngerðir um tillutan og útbjóðing av aliloyvum

Síðuleypandi við arbeiðinum við rakstrarkunngerðini, hevur Uttanríkis- og Vinnumálaráðið eisini arbeitt við tveimum øðrum kunngerðum, ávíkavist kunngerð um tillutan og kunngerð um útbjóðing av aliloyvum.

Kunngerðin um tillutan av aliloyvum skipar loyvisvirksemið kring tillutan av aliloyvum. M.a. verður ásett, hvørjar firðir, tað ber til at fáa aliloyvi til. Eisini verður ásett, hvørjir upplýsingar skulu fylgja við einari umsókn um aliloyvi.

Kunngerðin um útbjóðing skal lesast í samanhang við kunngerðina um tillutan av aliloyvum. Kunngerðin um útbjóðing snýr seg í høvuðsheitum um útbjóðing av nýggjum aliloyvum.

## 4.4. Løgtingslóg um kóp

Í samband við amerikansku kópalóggávuna Marine Mammals Protection Act (MMPA), er neyðugt at gera broytingar í reguleringini av tøku av kópu, um føroyskar fyritøkur framhaldandi skulu kunna útflyta fiskavørur til USA aftaná 2021.

Fiskimálaráðið legði tí fyrr í ár fram uppskot til nýggja løgtingslóg um kóp, sum í stóran mun snúði seg um at taka atlit til amerikansku krøvini. Fyri at lukkast at leggja lógaruppskotið fyri Løgtingið áðrenn freistin var farin, varð uppskotið ikki sent til ummælis áðrenn. Havbúnaðarfelagið hevur tó gjørt viðmerkingar, sum eru sendar vinnunevnd løgtingsins, sum viðgjørdi lógaruppskotið.

Lógaruppskotið var eitt av teimum, sum Løgtingið ikki varð liðugt at viðgera, tá Løgtingið fór í summarfrí, og tað fer tí eftir øllum at døma at detta burtur, tá nýtt tingár byrjar.

## 4.5 Løgtingslóg um náttúrumargfeldni

Uppskot til nýggja náttúrmargfeldislóg var sent til ummælis í apríl 2018. Uppskotið er gjørt við fyrimynd í norsku naturmangfoldloven, er umfatandi í vavi og regulerar nógv ymisk náttúruviðurskifti. Torført er enn at siga um ella hvussu nýggja lógin fer at ávirka føroyskan havbúnað, tí tað eisini er tengt at tí praksis, sum verður løgd frá umhvørvisfyrisitingini og kærumyndugleikum.

Við lógini verða ymisk nýggj prinsipp sett í verk, sum ætlandi skulu vera leiðbeinandi fyri umsitingina av hesari lógini og øðrum lógum eisini. Dømi um hetta er fyrivarnisreglan.

Í sínum hoyringssvari legði Havbúnaðarfelagið lagt dent á, at umhvørviskrøv mugu vera saklig, gjøgnumskygd og grundað á vísindaliga vitan, og at orka má vera til at umsita lógina.
Lógaruppskotið var eitt av teimum, sum Løgtingið ikki varð liðugt at viðgera, tá Løgtingið fór í summarfrí, og tað fer tí eftir øllum at døma at detta burtur, tá nýtt tingár byrjar.